## Beckham skal til Europa

So greiður er boðskapurin frá landsliðsvenjaranum Fabio Capello, um David Beckham ynskir at vera partur av enska landsliðnum í HM-endaspælinum næsta ár. – Beckham veit væl, at um hann ikki kemur aftur til Europa og eina størri deild í desember, so hevur hann ongan kjans at koma við til HM, sigur Capello við Reuters.



## Apoel Nicosia møtir FCK

Eftir at hava vitjað í Føroyum og sent EB/Streym úr Champions League undankappingini, skal Apoel Nicosia aftur til danska kongaríki, tí 18. ella 19. august skal liðið spæla í móti danska liðnum FCK. FC Keypmannahavn kundi annars møta bæði Olympiakos og Levski Sofia, men fekk í staðin kypriotisku meistararnar, sum ikki høvdu nakran trupulleika við at basa EB/Streymi, tí tilsamans gjørdist úrslitið í teimum báðum dystunum 5-0.



# Sambandið hølvaði Venstre av

**Kaj Leo Johannesen, núverandi løgmaður og fyrrverandi landsliðsleikari, gjørdi tvey mál í móti Venstre leygardagin**



**Talan var um stórsigur til føroyska Sambandsflokkin, tá fótbóltsdystur var millum Sambandsflokkin og danska systurflokkin, Venstre, leygardagin**

FÓTBÓLTUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*
*Myndir: Ólavur Fredriksen*

At tveir fyrrverandi landsliðsleikarar vóru á føroyska sambandsliðnum gjørdi kanska munin, tá Sambandsflokkurin í gjár hølvaði Venstre av.

Dysturin endaði 5-2 til Sambandsflokkin. Kaj Leo Johannesen, løgmaður og fyrrverandi landsliðsmálmaður, skeyt tvey av málunum.

Millum leikararnar hjá Sambandsflokkinum var eisini Gunnar Mohr, fyrrverandi landsliðsleikari og HB´ari.

Forsætisráðharrin sjálvur, Lars Løkke Rasmussen, var við á liðnum hjá Venstre har hann eisini var liðformaður.









